


www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 08 - 2013

# Statoil finnur aftur olju við Newfoundland

Norska Statoil hevur gjørt eitt nýtt oljufund út fyri Newfoundland. Hetta er triðja oljufundið felagið ger í kanadiskum havøki eftir stuttari tíð. Fundið er gjørt í Flemish Pass-lægdini, umleið 500 kilometrar í ein landssyning úr St. John. Hetta er annað fundið í hesum árinum. Góða úrslitið kemur eftir eina miðvísa og umfevnandi leitikampanju í hesum økinum og er fundið sera gott fyri Statoil, sigur Tim Dodson, leitistjóri hjá felagnum. Hann sigur, at Statoil fer at bora fleiri avmarkingarbrunnar í hesum økinum seinni. Tað var boripallurin West Aquarius, sum rakti við olju á 1100 metra dýpi. Hon liggur umleið 20 kilometrar frá tí stóru oljukelduni, Mizzen, sum Statoil fann í 2010, og sum verður mett at goyma 100-200 milliónir tunnur av olju. Oljuleitingin til havs í Kanada er partur av strategiini hjá norska oljurisanum, sum er farin at bora brunnar á djúpum vatni nógva staðni kring heimin, eitt nú í Føroyum eisini. Felagið hevur fingið sera góð úrslit bæði í Eysturafrika, út fyri Brasilia, í Norðsjónum og í Barentshavinum. Nú restar bert hjá felagnum at finna olju við Føroyar. Tann royndin verður so gjørd aftur í komandi ári, hesumegin Atlantshavið.